# Anna Joensen

Tá vit arbeiddu her saman, Anna Joensen og eg,
tá komu mangir sjeikar inn á okkara kafé.
Men so ein dagin síggja vit, ein sera spelknan mann,
so flottan og so fríðan, ja ein gjørdan Don Juan.
Anna Joensen var pjakut, men tá hann so kom á gátt,
fleyg hon straks ímóti honum, smikrut sum eitt frell og spott.
Tó eg royndi alt eg kundi, næstan rann hvørt fótaspor,
so var tó altíð Anna Joensen tann fyrra til hans borð.

Men hann vitjaði so javnan, og so spentar royndu vit
at fá' at vita meir um fýrin - tó við fyrilit;
og so ein dagin segði hann seg hava væl lønt starv
á virkinum hjá pápanum og væntaði ein arv.
Anna Joensen og eg, vit droymdu hvør í sínum lag,
dreym um hús og bil og pengar og ein mann av góðum slag,
men eg tordi ei at vóna, at hann hevði hug á mær,
tí sjálvsagt hevði Anna Joensen tann besta kjansin har.

Hann var høviskur og hevði stóran ring við diamant;
vit báðar høvdu oyrnalokkar, annað pynt og fjant
og varrareytt og naglalakk á fingrum og á tóm;
í sunndagsklæðum yrkadag og okkar' bestu skóm.
Anna Joensen var vøkur, yndislig í brún og brá.
Nøsin hennara var bein og - mín var greflig, reyð og skrá.
Hon var kløn og snøgg, men eg var meir at siga stutt og rund.
At eg hevði lítlan kjansin har, tað skilti eg um stund.

So ein dagin kendi eg mær ein so meinan hjartasting,
tí tá kom Anna Joensen og vísti mær sín ring.
Tá tók eg av mær oyrnalokk og naglalakk og alt,
og tað sum síðan hendi, tað er stutt og skjótt fortalt.
Anna Joensen seg iðraði, tað skilja vit øll jú,
tí ein svindlari, tað var hann, og tí er hann horvin nú.
Og eg standi enn við diskin og eg eri bara glað,
tí hevði hann havt biðið meg, so hevði mestur eg sagt ja.

*Sverri Egholm*